Heini Joensen:

– Hugsaði ikki um støðuna

Flestu í høllini mundu halda ondini, tá Heini Joensen skuldi taka seinasta brotskastið í dystinum, men sjálvur var føroyski skjúttin púrasta kaldur

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Talvan vísti 29 minuttir og 43 sekund. Støðan var 23-22 til Beliga, og Ingi Olsen var júst togaður niður, soleiðis at Føroyar fyri níggjundu ferð í dystinum fingu møguleikan av sjey metra blettinum.

Beint undan hesum hevði Mortan Hansen tvær ferðir misnýtt líknandi royndir, og nú varð Heini Joensen settur at skjóta. Øll í høllini mundu halda ondini – Belgiski málverjin royndi eitt sindur provokerandi at arga Heina, tá hesin skuldi hava bóltin. Eitt slag av sálarligum spæli, hvørs einasta endamál var at órógva føroyska skjúttan.

- Alt hetta kundi tó gera tað sama. Heini fekk at enda bóltin, og eftir fyrst at hava hótt eitt skot, sendi hann bóltin í belgisku meskarnar til javnleik. Ein støða, sum eisini helt sær seinastu sekundini, og so var fyrsta EM-stigið í undankappingini veruleiki.

Tá vit eftir dystin hittu Heina á máli, helt hann tó ikki, at tað hevði staðið so nógv á hjá sær hesa løtuna.

- Satt at siga, so hugsi eg ikki so nógv um støðuna, tá brotskast skal takast. Tað sum ræður um, er at senda bóltin í málið.

Men málverjin royndi jú eisini at fáa nervarnar hjá tær í kók. Órógvaði hetta ikki?

- Nei. Í slíkari støðu mást tú bara royna at ignorera hatta. Fert tú fyrst at hugsa um hetta sum nakað persónligt millum teg og málverjan, so er skjótt at missa fokus, og so hevur tú tapt. Eg hugsaði alla tíðina um at skora, og tó at málverjin nart við bóltin, so fór hann inn. Kanska júst tí, at eg hevði trúnna uppá, at hann skuldi fara inn. Tað er ofta tað, sum skal til, um tú skalt fáa bóltin tað seinasta pettið inn um málstrikuna, segði Heini Joensen at enda.

Rasmussen & Weihe vunnu Føroya Bjór Cup



Rasmussen og Weihe gjørdust vinnarar av kappingini

Um vikuskiftið skipaði Havnar Bóltfelag fyri firmakapping, og eftir 123 dystir stóð greitt, at Rasmussen og Weihe gjørdust vinnarar av kappingini

FIRMAKAPPING
Tíðindaskriv

Einir 200 mans - og ein einstøk kvinna - býtt upp í 36 lið luttóku í firma – og einstaklingakappingini, Føroya Bjór Cup, sum HB skipaði fyri leygardagin 11. januar. Har vóru bæði stjórar, formenn, landsliðsleikarar og "vanligir" arbeiðarar í rokanum í teimum 123 dystunum. Eitt lið varð tíverri kolldømt aftaná at hava vunnið hálvfinalubólkin hjá sær, tí teir høvdu brúkt ein ólógligan leikara. Kanska spell fyri kappingina, men reglur eru reglur. Fyrireikararnir báðir, Jan Falkenberg og Marni Mortensen siga, at kappingin sum heild gekk uppá stás, og at kalla allir dystirnir vórðu avgreiddir til ásettu tíðirnar. Lagt var fyri klokkan 9.30 leygarmorgunin, og so var hildið á uttan íhald til kl. 22.00.

Eitt "blandað" garvað lið frá Rasmussen & Weihe - við m.ø. einum væluppløgdum Pól Thorsteinsson á liðnum - vann finalubólkin og sostatt kappingina rættuliga trygt, meðan eitt ungt lið av Strondum, Team Jón Joensen kallað, ognaði sær 2. plássið. Liðið hjá Høgna Mikkelsen tók tey flestu á bóli - allarhelst seg sjálvar eisini - og fekk eitt flott 3. pláss. Hini liðini í finalubólkinum vóru Kjøth, Brandstøðin og Poul Michelsen.

Aftaná kappingina takkaði HB-formaðurin, Birgir Enghamar, luttakandi liðunum fyri luttøkuna og Føroya Bjór, sum stuðlaði kappingini fíggjarliga.

Luttøkupeningurin fer til ungdómsarbeiðið hjá felagnum. Síðani handaði leiðarin hjá Føroya Bjór í Havn, Petur Petersen, bestu liðunum heiðursmerki og steyp.

Team Jón Joensen av Strondum gjørdist næstfremsta liðið í finalubólkinum

Liðið hjá Høgna Mikkelsen stendur seg vanliga væl í firmakappingunum, og hesa ferð ognaðu teir sær eitt triðja pláss

Búskaparfrøðingar

Landsbankin søkir eftir 3 búskaparfrøðingum. Ein av hesum er fyri fólk í farloyvi í fyribils 3 mánaðir.

Arbeiðsuppgávur:
Menning av búskaparmodelli og útbygging av hagtalsskipanum um kredittmarknaðin og gjaldførið í landinum.

Aðrar uppgávur snúgva seg um, at leggja til rættis hagtøl og frágreiðingar um búskap og fíggjarviðurskifti og at arbeiða við menningaruppgávum viðvíkjandi føroyska kredit- og kapitalmarknaðinum.

Arbeiðið er býtt í ábyrgdarøki, men stovnurin er lítil og uppgávurnar stórar. Tí verður nógv arbeiði gjørt í felag, eins og tað er skiftandi.

Førleiki:
Søkt verður eftir fólki við góðari útbúgving. Hinvegin kunnu góðar arbeiðsroyndir eisini viga upp ímóti tí.

Fólk við kandidatprógvi í búskaparfrøði geva fyrimun. Royndir av arbeiði við innanhýsis og uttanhýsis verkætlanum hava somuleiðis fyrimun.

Løn:
Eftir avtalu við støði í sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Tíðarfreist o.a.:
Vit hava brúk fyri fólki rættiliga skjótt, men hava eisini áhuga fyri seinni setanartíð, um talan er um fólk við røttu royndunum.

Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Sigurd Poulsen, stjóra (sigurd@landsbank.fo) ella Jens Erik Magnussen, undirstjóra (jem@landsbank.fo) um fleiri upplýsingar á tlf. 318305.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við neyðugum upplýsingum um útbúgving og starv sendast landsbankanum áðrenn 30.01.2003 kl 16:

Landsbanki Føroya
Müllers Hús - Gongin
Postrúm 229 - FO-110 Tórshavn
E-postadr.: landsbank@landsbank.fo

Landsbanki Føroya er bankasamband landskassans. Hann umsitur gjaldføri og stendur fyri lántøku landsstýrisins og samstarvar við aðrar myndugleikar og almennar stovnar.

Landsbankin virkar fyri tryggum fíggjarviðurskiftum í landinum. Bankin skal tí halda seg kunnaðan um fíggjarmarknaðarviðurskifti og samstarva við fíggjarstovnar og landsstýrið um hesi viðurskifti. Lýsingar av búskapinum eru týðandi liður í hesum uppgávum. Sí eisini heimasíðuna http://landsbank.fo

TM Junior

Útsølan byrjar mánamorgunin 20. januar kl. 8.00

Leygardagin er stongt

TM Junior
Vælkomin
Dr. Jacobsensgøta 15
Tlf 311099
(við síðuna av Lampubúðini og Skálabúðini)

KOYRT OV SKJÓTT ?
BROTIÐ VÍKISKYLDUNA ?

TEORI TIL ENDURTØKU / EFTIRANSANDI KOYRIROYND

SKIPAÐ VERÐUR FYRI VIKUSKIFTISSKEIÐIÐ
18. OG 19. JANUAR og
25. OG 26. JANUAR

Tilmelding á tel. 31 88 21 ella 21 87 77

SP/F Koyrikortið
v/ Hans J. Hermansen
Slættanesgøta 5

ÍSLAND - FØROYAR

5.-8. juni 2003

Íroknað prísinum er:

Flogferð Føroyar-Ísland t/r v/ferðaavgjøldum · Hotel í 3 nætur v/morgunmati

Atgongumerkið til dystin Ísland - Føroyar

Prísur: 4.995,-

Tilmelding hjá 12. manni á tel 213 212 ella hjá MB-Tours á tel 32 21 21

MB-TOURS

Lesið Sosialurin -tað loysir seg